À jólum eru vit til rei›ar

N‡ggja vaktarskipi›, sum var› navngivi › leygardagin, er eitt t‡dningarmiki› li› í ætlanunum føroyingar sjálvir skulu røkja alt vaktar- og bjargingararbei›i í Føroyum

Brimil
Áki Bertholdsen

Ullstein, Sosialurin: -Eg haldi, at vit hava fingi› eitt gott skip. Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur í fiskivinnum›alum hev›i ikki sæ› n‡ggja vaktarskipi› Brimil, fyrrenn ta› var› navngivi› leygardagin.

Hann var sera væl nøgdur vi› ta›, hann sá og hann dylir ikki fyri, at hetta var ein stórur dagur í hansara politiska lívi, hóast hann heldur ikki dylir fyri, at ta› var John Petersen, fyrrverandi landsst‡risma›ur í fiskivinnumálum, sum eigur størstu æruna av, at skipi› nú er bygt, tí ta› var hann, sum loysti ta› úr lagdi og sum fekk tingi› at útvega pening til endamáli› .

Jørgen Niclasen sigur, at tá i› byggingin av Brimli var› fyrireika›, var endamáli› at vit skuldu hava eitt skip, sum kundi allar tær uppgávurnar, sum framtí›in fer at krevja, at vit eru før fyri at røkja, bæ›i í altjó›a sjógvi, eins væl og undir Føroyum.

- Eitt nú krevst av okkum, at vit taka lut í eftirlitinum á altjó›a sjógvi Flemis Cap og Irmingarhavinum.

- Vit skulu sostatt hava eitt skip, sum bæ›i kann røkja tær stóru uppgávurnar í altjó›a sjógvi, men sum eisini kann røkja uppgávurnar undir Føroyum, og heilt undir landi eisini. Og ta› er ikki sum at siga ta›, tí umframt tey stóru skipini, hava vit eisini væl yvir 1.000 smábátar. Og eitt slíkt skip heldur hann, at vit hava fingi› vi› Brimli.

- Vi› hesum skipinum, saman vi› Tjaldrinum og Spógvanum, eru vit væl fyri at røkja Vaktar og Bjargingartænastuna á sjónum.

N‡ggja føroyska vaktarskipi› var› navngivi› um vikuskifti›. Mynd: Áki Bertholdsen

Til rei›ar fyri Jól

Men so er ein t‡dningarmikil uppgáva eftir at loysa, og ta› tyrlutænastan. Men ta› uppgávuna eru vit komin undir land vi› at loysa nú. Jørgen Niclasen sigur at eitt uppskot um tyrlutænastuna á landi hevur veri› til vi›ger›ar í samgonguni.

– Eg haldi, at vi›ger›in er komin so langt, at uppskoti› um tyrlutænastuna kann ver›a lagt fyri landsst‡risfund í hesi vikuni og sí›ani kann ta› ver›a lagt fyri tingi›. Landsst‡risma›urin í fiskivinnumálum sigur, at uppskoti› ber í sær, at Landsst‡ri› skal keypa hesa tænastuna frá Atlantsflog. Ta› vil siga, at ta› ver›ur Atlantsflog, sum útvegar sær eina tyrlu afturat, sum landsst‡ri› so skal leiga til fiskivei›ieftirlit og til bjarging.

Jørgen Niclasen sigur, at ver›ur uppskoti› samtykt, sum alt bendir á, skuldi ta› bori› til at Atlantsflog fekk útvega sær eina tyrlu fyri jól. Sostatt skuldu vit tá veri› fult til rei›ar at átiki› okkum vaktarhald og bjarging bæ›i á sjógvi og landi.

Hann sigur, at tey hava kanna›, hvør tyrla er best egna› og fyribils ni›urstø›an er, at rættast er at útvega eina tyrlu, sum líkist teirri, sum er, men ta› er ein serútgjørd bjargingartyrla vi› nógv størri og sterkari motorum - hon hevur nevniliga tveir motorar, so hon kann flúgva, hóast annar ste›gar.

- Hetta er ein mi›alstór tyrla. Hildi› ver›ur ikki, at ta› er rá›iligt at útvega eina størri tyrlu, tí hón skal eisini kunna flúgva á smápláss, har ta› ofta er tronglit at manøvrera, ikki minst í ringum líkindum. Tyrlan, sum tey hava hugt eftir, er tr‡ ár, men hon hevur mest veri› brúkt til frams‡ningar og hevur ikki nógvar flúgvitímar.

Jørgen Niclasen sigur, at tá i› alt hetta er komi› í rættlag, fer Vaktar og Bjargingrtænastan at kosta ta› um 45 milliónir um ári›.

Men hví brúka allan hendan peningin ísta›in fyri at lata tyrluna hjá donsku sjóverjuni, sum er er kortini, røkja hesa uppgávuna?

- Danska sjóverjan hevur eina tyrlu, sum kann taka f‡ra fólk og ta› er ikki nógv, um ein heil skipsmanning kemur í vanda.

- Men ta›, sum vit eisini eiga at gera okkum greitt, er, at danska sjóverjutyrlan er verri enn so tøk alt ári›, tí hon er bara her ein part av árinum.

- Hon er ein trygd, tá i› hon er her, men ta› er so oftani, at hon ikki er her. Ta›, sum vit hava brúk fyri, er ein tryrla, sum er her at veita okkum trygd alt ári›. Ta› fáa vit bara, um vit taka um endan sjálvir. Og ta› haldi eg, at ein siglandi tjó› sum Føroyar eiga at gera.

Vónbrotin av dønum

Vit spurdu eisini fiskimálará›harran um hann framvegis heldur ta› vera rætt, at vit hava bygt eitt n‡tt vaktarskip fyri 95 milliónir, tá i› vit kundu fáa Beskytteren fyri nógv minni. Jørgen Niclasen er fullvísur í, at ta› var rætt at byggja.

-Beskytteren var eitt gamalt skip og hann var sera d‡rur í rakstri. Hann var heldur ikki serliga væl egna›ur til tær flestu av teimum uppgávum, sum eitt føroyskt vaktar- og bjargingarskip skal røkja. Men vit bjó›a›u okkum at leiga Beskytteren, treyta› av, at danska stjórnin gjørdi hann ístan, so at hann lúka›i treytirnar hjá Skipas‡ninum.Ta› ger Beskytteren ikki ney›turvuliga sum er, tí hann er bygdur til danska herflotan og tey skipini ganga eftir ø›rum reglum.

- Ta› vildu danir ikki og vi› teirri óvissu sum var um prísin, valdu vit heldur at byggja sjálvir. Men Jørgen Niclasen vi›gongur tó, at ta› er hugstoytt at hoyra, at danir sí›ani hava lati› eitt av Baltalondunum Beskytteren fyri einki og hava harafturat bundi› seg til at betala fleiri milliónir at gera hann ístan fyri.

– Men eg meti framvegis, at vit hava valt ta røttu loysnina, sigur Jørgen Niclasen.

Hetta er ein føroysk loysn, sum er nógv betri og bíligari í longdini, enn ta› hev›i veri› at keypt ella leiga Beskytteren.

Telefonbókin 2001

Í mars 2001 verður telefonbókin fyri ár 2001 borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum.

Virki og stovnar skulu boða frá um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt í næstu útgávu.

Seinasta freist at lata broytingar inn er ***týsdagin 31. oktober 2000***

Hvítu síður

Týsdagin 31. oktober 2000 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2001 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 548 í telefonbókini 2000, ið skal sendast til: Teknisk avgreiðsla, Føroya Tele, Postboks 27, FO-100 Tórshavn ella faks 31 79 68.

Eykaupptøkur v.m.:
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 57,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

Búmerkið:
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 1.500,00 kr (ikki íroknað mvg).
Talið av búmerkjum í Hvítu síðum er avmarkað.

Gulu síður

Týsdagin 31. oktober 2000 er seinasta freist, at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum. Skrásetingar-/rættingarblað til Gulu síður er á síðu 547 í telefonbókini 2000, ið skal sendast til Teleforlagið.

Prísir:

(A)+(D)	Standardlýsing	kr.	650,00
(B)	Stórt navn	kr.	50,00
(C)	Innramming	kr.	100,00
(E)	Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm)	kr.	20,00

Litlýsingar:
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.

GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!

FØROYA TELE

att: Teleforlagið
Postboks 27 · 110 Tórshavn · tel 30 30 30 · fax 30 30 31
www.nummar.fo · info@nummar.fo

Annelena var gumma

BRIMIL
Áki Bertholdsen

Ta› var Annelena Niclasen, kona Jørgen Niclasen, fiskimálará›harra, sum fekk hei›urin av at doypa n‡ggja vaktarskipi›. Og ta› gjørdi hon vi› hesum or›um:

Sum láturverja sterk
Útinn títt verk
Um Atlantshavs bylgjur
Tú sjófólki fylgir
Fyri landi tú verji skal vera
Navni› Brimil skal bera

Brimil er gó›ar 63 metrar langur, gó›ar 12 metrar brei›ur, hann hevur tveir motorar, uppá tilsamans 5.400 hestar og teir kunnu geva honum eina fer› upp á yvir 17 míl.

Somulei›is er støddin og útger›in solei›is, at ta› er væl hóskandi at arbei›a undir landi vi›. Brimil er væl útgjørdur vi› kranum og spølum og hann sleipar yvir 160 tons.

Av serligari útger› hann hevur, kann nevnast, at umframt høvu›sskrúvuna, hevur hann tvær sí›uskrúvur, harav tann eina er ein azimut skrúva, ta› er ein skrúva, sum kann vendast ymsar vegir. Hetta ger, at ta› ber til at leggja bátin púra stillan, tá i› ta› krevst og vi› einum joystikki ber ta› so til at flyta hann spakuliga hagar og hagar og ta› ver›ur mett at vera eitt sera stort framstig afturímóti Tjaldrinum.

Umframt útger›ina, sum skipi› hevur, vóru føroysku rei›ararnir ógvuliga hugtiknir av, hvussu gott handverk skipi› er.

Men hetta er eisini fyrsta skipi›, sum Myklebust Mekaniske Værksted hevur bygt til Føroyar og á norsku skipasmi›juni duldu tey ikki fyri, at teir høvdu havt ein serligan tokka til Brim og høvdu gjørt sær rættiliga stóran ómak fyri at vísa, hvør dugur er í teimum.

Hetta er eitt skip, sum vit eru ógvuliga errin av at hava bygt, seg›i ein av oddamonnunum á norsku skipasmi›juni.

Umbo›ini fyri føroysku eigararnar fegna›ust eisini um samstarvi› vi› norsku skipasmi›juna og í fleiri førum er skipasmi›jan komin vi› betri loysnum, enn føroyingar høvdu kravt.

Annelena Niclasen er tilrei›ar at at sveiggja sjampanjufløskuna ímóti skipssí›uni

Hetta sæst aftur í, at alt skipi› er avbera snotiligt og snøgt og ikki minst eru umstø›urnar hjá manningunum sera gó›ar.

Men vegna trætu imillum teir, sum skulu manna n‡ggja skipi› fíggjarmálast‡ri› um løn mátti Brimil sigla framvísingartúr undir norskum flaggi og vi› norskari manning.

Brimil hevur kosta› 95 milliónir at byggja.

Erland Beder prestur í Vági

Me›an presturin á Tvøroyri hevur frí í tríggjar vikur, ver›ur Erland Beder prestur í Vági, tí Su›uroyggin má hava minst tveir prestar, heldur bispur

Stefan í Skorini

Í tríggjar vikur skal Erland Beder ver›a prestur í Vági, og ta› ver›ur í november mána›i, at hann tekur vi›. Erland Beder er fyrrverandi prestur, men hevur lagt frá sær vegna aldur fyri langari tí› sí›ani. Hann er vágbingur, og tí skuldi ligi› væl fyri hjá honum at fari› til Vágs.

Petur Martin Rasmussen, sum er prestur á Tvøroyri, hevur rætt til tríggjar frívikur, og tær tekur hann í november. Hans Jacob Joensen, bispur, heldur ta› ikki vera rá›iligt, at bara ein prestur er í Su›uroynni í tríggjar vikur. Hin presturin í Su›uroynni er Ólavur Rasmussen í Hvalba. Tí hevur veri› ney›ugt at heita á Erland Beder um at hjálpa til hesar vikurnar, og bispur sigur seg vera sera takksaman fyri, at Erland Beder hevur játta› at tiki› vi›.

Hans Jacob Joensen sigur eisini, at ta› av røttum skuldu veri› tríggir prestar í Su›uroy, men enn er eingin prestur settur í Su›uroyar Sunnara Prestagjaldi.

Í summar var› starvi› l‡st leyst at søkja, men bara ein umsøkjari var til starvi›. Tí vildi kirkjurá›i› heldur søkja einafer› afturat í vón um, at fleiri fara at senda umsókn inn.

Søkt ver›ur eftir ætlan einafer› fyrst næsta ár. Tá ver›a nakrir n‡ggir prestar lidnir vi› sína útbúgving, og tí eru betri útlit fyri fleiri umsøkjarum. Eingin prestur hevur veri› í Vági sí›an í vár, tá Elsa Funding fór frá.

Lesið Sosialin
5 dagar
um vikuna

VØRUHÚSIÐ Á HJALLA
TELDUDEILDIN

3.198,-

DVD video
Oritron 100
Kodufrítt - spælir allar DVD filmar.
Bara 36 cm breitt.

Stórt úrval av DVD keypsfilmum

Í región 1 hava vit til dømis:
Any Given Sunday - American Pie Unrated - Dogma - Bowfinger - Man On The Moon - Romeo Must Die - GalaxyQuest - The Truman Show - Saving Private Ryan - American History X - The Fifth Element - Three Kings - Double Jeopardy - House On Haunted Hill

Í región 2 hava vit til dømis:
10 Things I Hate About You - Bone Collector - 8 MM - Patch Adams - Familieterapi - Enemy Of The State - Den Sjette Sans - Den Grønne Mil - Armageddon

Allir filmar eru góðkendir av Filmseftirlitinum

Vøruhúsið á Hjalla
Tlf: 34 25 00 Teldudeildin